Álit

í

løgtingsmáli nr. 95/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heilivág (At ferðandi kunnu hava við sær heilivág til egna nýtslu til landið)

Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinna, hevur lagt málið fram 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð tann 28. apríl 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Posta, landsstýrismannin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, saman við TAKS og landsstýriskvinnuna í heilsu- og orkumálum, Eyðdis Hartmann Niclasen.

Í uppskotinum verður nágreinað, at 'ferðandi' kunnu hava heilivág við sær til egna nýtslu til landið.

Útgangsstøðið er, at Apoteksverkið hevur einkarætt at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág.

Tó ásetur lógin, at persónar kunnu flyta inn heilivág til egna nýtslu.

Avgerð hjá Føroya Kærustovni hevur staðfest, at verandi lóg loyvir persónum at flyta inn heilivág til egna nýtslu, bæði við komu til Føroyar og sum post. Heimildin er tí ikki avmarkað til ferðandi, sum koma til landið.

Orðingin í gomlu lógini nýtti heiti 'ferðandi', og hóast verandi lóg nýtir heitið 'persónar', so var endamálið við ásetingini, at hon skal fevna um 'ferðandi', t.e. einstaklingar við ella uttan bústaði her á landi, sum hava heilivág við sær til egna nýtslu til landið.

Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at verandi orðing forðar fyri, at endamálið við ásetingini verður rokkið, samstundis sum møguleikarnir hjá eftirlitsmyndugleikunum verða skerdir.

Postsendingar, sum áður høvdu verið afturhildnar og burturbeindar av eftirlitinum, verða nú ístaðin bornar út til hurðina hjá móttakaranum.

Við hesum lógaruppskoti verður orðaljóðið í ásetingini gjørt meira nágreiniligt og samsvarandi galdandi viðmerkingum til lógina, soleiðis at tað aftur verður ein treyt, at tann heilivágur, sum ferðandi hava við sær, er ætlaður til teirra egnu nýtslu, og at talið ella mongdin av heilivági er hóskandi til eina vanliga persónliga nýtslu.

Nevndin heitir á landsstýriskvinnuna í heilsumálum um at áseta nærri reglur um, hvussu stórar mongdir av heilivági ferðandi kunnu hava við sær til egna nýtslu, soleiðis at eftirlitsmyndugleikin hevur greiðar heimildir og leiðbeining um handfaring av heilivági, sum ferðandi hava við sær til egna nýtslu til landið.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 12. mai 2026

Grímur Sundstein formaður	Sámal Petur í Grund næstformaður	Liljan Weihe
Sunnvá Dahl Høgfeldt	Magni Højgaard	Bjørt Lind
	Bjørg Brynhildardóttir Egholm	